## Danmark er fyrimynd

Politikarar og onnur leiðandi fólk í londum sum Fraklandi og Týsklandi kundu fingið okkurt gott burtur úr einari vitjan í Danmark, heldur OECD.

Felagsskapurin vísir á, at Týskland og Frakland hava stórar trupulleikar av arbeiðsloysi, men at soleiðis er tað ikki í Danmark. Orsøkina sigur OECD vera, at tann danski arbeiðsmarknaðurin er nógv smidligari, og hesum eiga týskarar og fransmenn at læra av, sigur búskaparfrøðingurin Paul Swain, sum hevur verið við til at skriva eina nýggja frágreiðing fyri OECD.

Í Týsklandi, Fraklandi, Spania, Italia, Grikkalandi og Belgia liggur arbeiðsloysið um 10 prosent, men í Danmark er tað bara umleið 5 prosent. OECD sigur, at ymsar nýskipanir, sum vórðu settar í gildi á danska arbeiðsmarknaðinum í nítiárunum, hava verið medvirkandi til, at danski búskapurin er vorðin ein tann sterkasti í Evropa. Frammanundan var hann ein av teimum veiku.

## Royki-bannið breiðir seg

Alt fleiri lond skerja samtykkja lógir og reglur, sum verja tey, ið ikki roykja, og nú hava myndugleikarnir í Norðurírlandi gjørt av at gera tað sama. Heilsumálaráðharrin, Sharon Woodward, sigur við AP, at politikararnir fara at viðgera tær nýggju reglurnar teir næstu mánaðarnar, og ætlanin er, at tær skulu koma í gildi innan árslok, sigur hon.

Bretska stjórnin umhugsar eisini at seta tiltøk í verk fyri at verja tey, sum ikki roykja. Fyri einum góðum ári síðani samtyktu myndugleikarnir í Írlandi at banna royking á vertshúsum og matstovum, og síðani hava altsamt fleiri politikarar í Bretlandi kravt, at tilsvarandi reglur verða settar í gildi har.

Higartil hava lond sum Noreg, Svøríki, Írland og Italia samtykt lógir, sum skerja møguleikarnar hjá fólki at roykja á arbeiðsplássinum og á matstovum, og finska stjórnin hevur boðað frá, at hon fyrireikar eina tilsvarandi lóg.

## Nógv happing á arbeiðsplássum

Ein kanning hjá felagnum Ledernes Hovedorganisation vísir, at happing er ein trupulleiki á 16 prosentum av teimum almennu og privatu arbeiðsplássunum í Danmark. Harafturat vísir kanningin, at á 40 prosentum av arbeiðsplássunum eru tey sálarligu viðurskiftini hjá starvsfólkunum ikki í lagi.

Lars Andersen hjá LH sigur við TV2, at happingin og teir sálarligu trupulleikarnir standast ofta av viðurskiftum, sum eru trupul at beina burtur. Tá talan er um happing, kann støðan gerast so álvarssom, at annar av pørtunum noyðist at finna sær annað arbeiði. Tí er tað umráðandi, at leiðslan leggur uppí so tíðliga sum gjørligt, sigur Lars Andersen.

Sambært LH kann tað ofta loysa seg at leita sær serkøna hjálp, og felagið sigur seg eisini hava staðfest, at eftirspurningurin eftir serkønari hjálp er veksandi.

## Tók alt aftur frá konuni

Tað vakti stóran ans, tá fyrrverandi stjórin í heimsins størsta tryggingarfelagi gav konu síni partabrøv fyri 12 milliardir krónur, eftir at myndugleikarnir høvdu gjørt av at kanna hansara fíggjarviðurskifti.

Mong hildu, at tann 80 ára gamli Maurice Greenberg gav konuni partabrøvini fyri at tryggja sær, at hann ikki skuldi missa tey, bleiv hann funnin sekur í sviki, og tað er helst tað, sum nú hevur fingið hann at taka gávuna aftur frá konuni, skrivar Wall Street Journal.

Maurice Greenberg noyddist at siga stjórastarvið í American International Group frá sær, tá løgreglan gjørdi av at kanna fíggjarviðurskifti hansara. Í hansara stað kom Martin J. Sullivan, og hann hevur neyvan nakað ímóti at verða sitandi í stjórastólinum, tí sambært Wall Street Journal fær hann slakar 35 milliónir krónur í løn í ár. Megnar hann at røkka teimum málum, sum nevndin í felagnum hevur givið honum tey bæði næstu árini, fær hann sambært blaðnum næstan 80 milliónir krónur sum eyka samsýning oman á lønina.

### UTTAN ÚR HEIMI



Leon LaPonte, generalur (vm.), sigur, at USA er ført fyri at basa Norðurkorea.
Mynd: Reuters

# USA er ført fyri at basa Norðurkorea

**Amerikanskar og suðurkoreanskar herdeildir eru førar fyri at basa Norðurkorea, sjálvt um landið hevur kjarnorkuvápn, sigur ovasti amerikanski generalurin í Suðurkorea.**

KOREA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

-Okkara egnu og tær suðurkoreonsku herdeildirnar eru førar fyri at forða øllum ágangi úr Norðurkorea, og er tað neyðugt, eru vit eisini førir fyri at basa landinum, sjálvt um tað kanska hevur kjarnorkuvápn.

Orðini eigur amerikanski generalurin Leon LaPonte, sum er ovasti fyri teimum amerikonsku herdeildunum í Suðurkorea. Sjálvur heldur hann, at norðurkoreanar hava minst tvær kjarnorkubumbur umframt eina munagóða rakettskipan, hvørs langtberandi rakettir eru førar fyri at raka mál í sjálvum USA.

Síðani í februar hevur norðurkoreanska stjórnin sýtt fyri at tingast við USA, Kina, Japan, Russland og Suðurkorea um landsins kjarnorkuútgerð, men seinastu tíðina hava tekin verið um, at stjórnin er sinnað at taka tingingarnar uppaftur, skrivar Reuters. Tað hevur sett tað diplomatiska virksemið í gongd, og so seint sum mánadagin var ein suðurkoreanskur ráðharri í Washington og tosaði við Dick Cheney, varaforseta um støðuna. Samstundis skrivaði russiska tíðindastovan Interfax frá norðurkoreonskum embætismonnum, at stjórnin í Pyongyang fyrireikar seg til at taka tingingarnar uppaftur.

Amerikanska stjórnin hevur gjørt greitt, at hon hevur ongar ætlanir um at leypa á Norðurkorea, men amerikanararnir eru kortini fyrireikaðir. Tann 18. juli fer tann serligi lærdi háskúlin hjá amerikanska herinum at skipa fyri einari ráðstevnu, sum skal lýsa, hvat kann henda, um kríggj brestur á ímillum USA og Norðurkorea, skrivar Reuters úr Washington.

# Hann verður halgimenni

**Vatikanið í Rom hevur nú gjørt av, at fyrrverandi pávin Jóhannes Páll Annar skal verða halgimenni.**

Vatikanið
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fleiri hava ta uppfatan, at Jóhannes Páll Annar var eitt halgimenni, longu meðan hann var á lívi, og tá hann fór til gravar tann 8. apríl, rópti mannamúgvan á Pæturstorginum "Santo subito". Vatikanið hevur seinni upplýst, at har hava teir fingið umleið teldupostar um dagin frá fólki, sum vilja hava fyrrverandi pávan til halgimenni.

Vanliga kann ein deyður ikki gerast halgimenni fyrr enn í fyrsta lagi fimm ár eftir sín deyða, men hesa ferð hevur eftirmaðurin, Benedikt 16., gjørt av at víkja frá hesari regluni. Tað sigst, at hann tók avgerðina, longu áðrenn hann gjørdist pávi.

Tað er kortini ein spurningur, hvussu skjótt Jóhannes Páll Annar alment verður lýstur halgimenni. Erkabiskuppurin Stanislav Dziwisz, sum var skrivari hansara, segði við polska sjónvarpið fyrradagin, at vónandi verður tað longu í august, men hann legði tó afturat, at so skjótt verður tað kortini neyvan.

Jóhannes Páll pávi Annar verður halgimenni.

